VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Mugu ikki styggja fólk av landinum

Um dagarnar frættist, at fólkatalið í Føroyum er so høgt sum ongantíð áður. Hetta eru sjálvandi gleðilig tíðindi. Samstundis vísti Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur, á, at hann roknar við, at hendan gleðin verður stokkut, tí eitt væntandi hægri arbeiðsloysi heilt víst fer at tvinga fólk at flyta av landinum.

Her áttu vit at lært av gjørdum mistøkum – og av kreppuni í nítiárunum, sum flestu okkara minnast.

Hyggjuráðini hjá landspolitikarunum tykjast vera sparingar. Sparingar so ógvusligar, at tær merkjast týðuliga – og sum ikki einaferð serliga hjá teimum veikastu samfelagsborgarunum.

Í drúgvari blaðsamrøðu í Sosialinum í síðstu viku og í útvarpinum hjá Kringvarpinum hevur Hermann Oskarsson týðuliga og greitt víst á skeivleikan í tí at fokusera so nógv upp á at spara okkum úr kreppuni. Hann sigur, at vit nógv heldur skulu hava eitt stórt undirskot á fíggjarlógini, heldur enn at styggja fólk av landinum við stórum arbeiðsloysi, sum er konsekvensurin, um vit bara hugsa um at sleppa undan stóra undirskotinum hjá landskassanum.

Hetta eru sjálvandi áhugaverd sjónarmið. Løgtingið hevur stungið út í kortið risastórar íløgur í tunlar. Vit mugu bara spyrja, um hetta er skilagóðar búskaparpolitikkur at brúka so nógvar pengar upp á íløgur, sum ikki kasta so nógv arbeiði av sær.

Formaðurin í Havnar Handverkarafelag skjýtur í blaðnum í dag upp, at vit í staðin fyri tunnilin norð um Fjall fara at byggja nýtt havrannsóknarskip. Hetta hevði sambært honum útvegað áleið 300 ársverk – og hevði á tann hátt sett nógv meira gongd í samfelagshjólini.

Tað hoyrist graml um, at landsstýrið hevur í umbúnað at seta ymisk tiltøk í verk so sum at minka rentustuðulin til setahúsalán, fiskimannafrádráttin o. s. fr. Fyri 24 árum síðani var eisini kreppa. Tá kom landsstýrið við nøkrum inntøkulógum, sum skuldu vera fyribils. Ein av hesum var lógin um oljuavgjaldið. Vit mugu bara staðfesta, at hetta avgjald er komið fyri at vera, og tá myndugleikarnir nú kalla tað eitt »umhvørvisavgjald«, so er tað ikki hissini manipulatión við minninum hjá fólki.

Øll vita, at tað er ikki lætt at fáa kabalina at ganga upp. Men vit mugu krevja, at tær íløgurnar, sum verða gjørdar, eru tær, sum kasta mest av sær til búskapin, og at tær sparingar, sum vera gjørdar, ikki rakar tey veikastu meinast.

Sosialurin

Arbeiðsskapandi tiltøk: Nýtt havrannsóknarskip

ELI BRIMSVÍK
formaður, Havnar Handverkarafelag

Vit hoyra dagliga um avleiðingarnar, sum búskaparkreppan hevur um allan heim. Og í Føroyum hoyra vit nú nærum hvønn dag, at fólk vera søgd úr starvi orsaka av sparingum.

Ein munur er kortini sjónligur. Meðan politikarar í øðrum londum seta skipanir í verk fyri at byrgja fyri ov stórum arbeiðsloysi, so tosa okkara politikarar so at siga bara um at spara.

Samstundis hoyra vit okkara leiðandi búskaparfrøðingar siga, at landskassin saktans tolir at hava undirskot í nøkur ár, og at ongin grund er til at seta tey stóru sparitiltøkini í verk.

Tað er umráðandi, at okkara politikarar lurta eftir serfrøðingum, sum í hesum føri eru búskaparfrøðingar. Sum støðan er vorðin í landinum mugu okkara politikarar – í eina tíð - leggja allan partapolitikk til viks, og í felag finna loysnir, sum skapa arbeiðspláss í landinum.

Gera teir ikki tað, so mugu teir rokna við, at teir koyra ein stóran part av arbeiðsmegini út í arbeiðsloysi, og verða noyddir at gjalda teimum arbeiðsloysisstuðul. Men gloymi ikki, at ongin ynskir at ganga arbeiðsleysur, og at tað altíð vil loysa seg betur at aktivera fólk heldur enn at lata tey ganga fyri onki.

Eg fari her at loyva mær at nevna eitt ítøkiligt dømi.

Í fleiri ár hava røddir verið frammi um, at vit eiga at skifta okkara gamla havrannsóknarskip Magnus Heinason út við eitt nýtt. Tað er nokk ongin ivi um, at Magnus Heinason hevur tant fyri seg, og at tíðin er farin frá honum.

Tí átti tað at veri eitt gylt høvi hjá okkara politikarum, at skipa so fyri, at vit fáa eitt nýtt rannsóknarskip til okkara høvuðsvinnu.

Mett verður, at eitt slíkt skip kostar millum 200 og 250 mió. kr. at byggja.

Sjálvandi skal nýggja havrannsóknarskipið byggjast í Føroyum. Leysliga mett kunnu vit siga, at tað tekur tvey ár at byggja skipið. Á henda hátt fáa umleið 150 føroyingar arbeiði í tvey ár. Av hesum kunnu vit rokna við, at 50–75 mió. kr. koma aftur í landskassan ígjøgnum skatt og avgjøld.

At fáa fígging til eitt slíkt skip er ongin trupulleiki, tað hava vit hoyrt fleiri dømi um í seinastuni.

Tá Havstovan herfyri fylti 50 ár frættist, at ein gáva uppá 10 mió. kr. var latin Havstovuni at byggja nýtt havnrannsóknarskip fyri. Samanumtikið mugu vit siga, at fyri landskassan er ikki talan um stórar upphæddir, her fáa vit heldur nógv fyri lítið.

Norð um fjall

Vit eru mong, sum eisini ráða okkara politikarum til at taka teir tiltiknu tunlarnar Norð um Fjall upp til nýggja viðgerð. Tá vit hugsa um, hvussu mong arbeiðspláss vit hava brúk fyri – eisini í Norðoyggjum - so tykist tað løgið, at leggja stórar millióna upphæddir í eina verkætlan, sum einans skapar arbeiði til einar 10-15 mans. Hesin peningur átti heldur at verið brúktur til aðrar verkætlanir í Norðuroyggjum, sum høvdu skapt nógv fleiri arbeiðspláss.

Í løtuni tikist tað sum um okkara politikarar eru falnir í fátt ella stríðast um bagatellir. Mín áheitan til teirra skal tí vera: Vælsignaði - kvinnur eins og menn á Føroya Løgtingi – vakni og fari til verka.

Tey ungu

Her er onki at bíða eftir, tað ræður um at fara til verka sum skjótast. Um onki verður gjørt kunnu vit rokna við, at stórur partur av teimum ungu rýma av landinum og koma ikki aftur.

Í hesum døgum verður tosað um at seta eina nýggja pensiónskipan á stovn í Føroyum. Tað er uppá tíðina at farið verður undir eina slíka skipan, men tað letur seg als ikki gera um tey, sum nú eru ung ikki fáa møguleika fyri at verða verandi í landinum. Uttan tey ungu fáa vit onga pesnsiónsskipan at virka.

Við vón um eina bjarta framtíð, ynski eg øllum eitt gott summar.

Til Eyðun á Borg

DAN R. PETERSEN

Fyrst roynir tú at billa fólki inn, at øll staðanøvn eru óbundin, og nú beklar tú tað sera vakra staðarnavnið Tjaldavíkshólmur til Tjaldavíkarhólmur. Gevst áðrenn tú blamerar teg meira og gert størri skaða.

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.